


**Nr. 11** ***21. mai 2023*** **83. árg.**

# Borðbøn

Ein keypmaður sá úr vindeyganum á skrivstovu síni ein bilførara, sum hvønn fyrrapart át sín matpakka niðri á gøtuni. Bilførarin tók fram fløskuna, drakk kaffi og át breyðflísarnar. Men áðrenn hann fór at eta, tók hann húgvuna av og hugdi upp móti himli. Kring hann larmaði ferðslan, eingin sá, hvat ið tað var, hann gjørdi, men eygu Guds hvíldu heilt vist við kærleika á honum. Keypmaðurin hevði eisini einaferð ansað eftir honum, og síðani tann dagin stóð hann ofta og eygleiddi bilføraran, tá ið hesin skuldi fáa sær morgunmat.

Hetta hevði so við og við ávirkan á keypmannin. Hann var vanur at fáa ein heilt øðrvísi leskiligan morgunmat, men hann hevði ikki hugsað um at prísa Gudi fyri matin. Men nú vaknaði samvitska hansara.

– – – – –

Tað eru mong, sum biðja borðbøn, tá ið tey eru einsamøll, men eru tey saman við fólki, so biðja tey ikki. Tá sláa tey hendurnar saman og bukka við høvdinum. Tað skal merkja, at tey hava biðið borðbøn.

Hin kendi Ludvig Harms var einaferð í einari slíkari veitslu. Hann bað sína borðbøn sum vanligt. Ein herviligur maður, sum vildi halda hann fyri rukku, segði: „Heima hjá tær biðja øll helst borðbøn.“

„Nei,“ svaraði Harms, „grísarnir og kýrnar biðja ikki.“

Latið okkum ikki skammast at biðja borðbøn. Eisini mótstøðumaðurin fær virðing fyri teimum, sum órødd vísa, at tey hava ærufrykt fyri Gudi.

*Effie Campbell* umsetti.

# Ein løgin fyrispurningur

Hin kendi evangelisturin Gipsy Smith hitti ein dagin ein ungan mann, sum ofta hevði verið á møti hjá honum, men enn var hann ikki blivin kristin.

Tá ið teir skiltust, og Smith hoyrdi, at maðurin ikki kundi koma á møti hetta kvøldið, segði hann: „Men so mást tú lova mær, at tú í staðin fyri vilt biðja fyri mær."

Maðurin gjørdist bilsin og segði: „Veitst tú ikki, at tú biður ein biðja fyri tær, sum ikki so frægt sum dugir at biðja fyri sær sjálvum?"

„Á, eg skal læra teg, hvussu tú skalt biðja!"

Hann tók ein pappírslepa fram og skrivaði á hann: „Gud vælsigna Gipsy Smith í kvøld og hjálp honum at boða títt evangelium í Andans kraft, so syndarar kunnu verða frelstir. Hoyr meg fyri Kristi skuld. Amen."

So segði Smith: „Vilt tú ikki í kvøld biðja hesa einfaldu bøn? Hon kann verða mær til stóra hjálp."

Tann ungi maðurin stóð tigandi eina løtu. Men so svaraði hann: „Jú, eg skal!" Og so fór hann skundisliga avstað.

Kvøldið eftir sá Smith hann sita á møtinum, og hann fór yvir til hansara.

„Tú mundi vitað, hvat ið tú gjørdi," segði ungi maðurin.

„Íðan, helt tú títt lyfti?"

„Ja, og tá ið eg skuldi boyggja knø og biðja, kom tað niður yvir meg, at eg var eitt vánaligt menniskja á jørð. Í mong ár havi eg ikki spurt eftir mínum Gudi og Faðir. Eg var so deyðaræddur, at eg fekk ikki tey orðini fram, sum tú hevði skrivað mær niður. Eg mátti bara rópa: „Gud, miskunna mær, stóra syndara!" Hann hoyrdi róp mítt og gav mær frið. Tá kundi eg fara at biðja fyri tær."

*Effie Campbell* umsetti.

# Sundursorað – klinkað saman aftur

*„Ja, stórverk gjørdi Harrin móti okkum, og fegin vit vórðu. Harri, vend tú lagnu vári sum áarløkum í suðurlandi!"*
*Sálm. 126,3–4.*

Um vit eiga ein dýran og flottan vasa og av óvart koma at skumpa undir hann, og hann dettur á gólv og brotnar, so koyra vit helst pettini burtur. Men yviri í Japan hava teir ein serligan

máta at umvæla steintoy. Tey henta øll pettini upp og líma tey saman við lími, har gullpulvur er blandað uppí. Á tann hátt sæst, at vasin hevur verið brotin, men hetta gevur honum nýtt lív. Hann blívur ómetaliga flottur og fær størri virði. Tey fagna brekini staðin fyri at fjala tey.

Hetta er ein góð mynd upp á sjálvt lívið. Myndin minnir okkum á, at tað, sum fer í sor hjá okkum, kann saktans samlast aftur. Vit kunnu koma sterkari og vakrari út yviri á hinari síðuni, eftir at vit hava fingið sprungur, tá ið vit vóru undir trýsti og ágangi.

Vit verða øll særd av og á. Tað er ein partur av lívinum, og vit hava glaspetti, sum skulu klinkast saman aftur; men tey eru eisini við til at mynda okkum, gera okkum klókari, eldri, meira ávirkilig. Tað er ikki neyðugt, at vit ganga og goyma tey sár, sum vit hava, staðin fyri kunnu vit fevna um tey, gera tey vøkur og minna okkum sjálv á, at vegurin millum veikleika og styrki er styttri, enn vit halda.

Hesin hugsanarháttur hjálpir okkum at koma gjøgnum miss og kreppur, tí hann vísir okkum, at vit kunnu samla pettini, og tá ið ferðin er at enda komin, standa vit eftir við einum betri úrsliti. Hetta lærir okkum eisini, at alt nýtist ikki at vera fullkomið og lýtaleyst, og at vit ikki skulu vera sløtt og rukkufrí, men at vit eru vakrast, tá ið vit vísa okkara arr og sýna fram, at vit eru HEIL menniskju.

*Effie Campbell* umsetti.

# Ein broyting

Einaferð var tað ein tornarunnur, sum vaks í einari veit. Ein dagin kom urtagarðsmaðurin har við einum spaka. Hann fór at grava rundan um tornarunnin. „Hví ger hann hetta? Veit hann ikki, at eg eri ein gamal virðisleysur tornarunnur?“ segði tornarunnurin bilsin fram fyri seg.

Men urtagarðsmaðurin tók hann við sær og gróðursetti hann millum sínar blómur, meðan tornarunnurin framvegis tosaði fyri seg sjálvan: „Hann ger eitt stórt mistak, tá ið hann plantar ein gamlan tornarunn millum síni rósutrø.“

Urtagarðsmaðurin kom aftur yvir til tornarunnin. Við einum hvøssum knívi skar hann ein skurð í børkin og podaði eina rósugrein inn í runnin.

Tá ið summarið kom, spruttu og spíraðu tær yndisligastu rósur út úr tí gamla tornarunninum. Tá segði urtagarðsmaðurin: „Tín vakurleiki kemst ikki av tí, sum kom út úr tær, men av tí sum eg legði inn í teg.“

Hatta er júst tað, sum Kristus ger við menniskju. Fyri okkum kann tað tykjast, sum eru vit púra virðisleys og til onga nyttu. So tekur Kristus okkum í hond sína, broytir okkum, lyftir okkum upp úr dustinum og leggur nakað av sínum lívi inn í okkum. Og skjótt fara vit at líkjast honum. Vit gerast smáar greinar, sum bera frukt.

*Effie Campbell* umsetti.

# Annaðhvørt – ella

Ein trúgvandi maður býtti út traktatir til øll, sum sótu í sama kliva sum hann í tokinum. Øll fóru beinanvegin undir at lesa. Tá ið ein løta var farin, hugdi ein maður upp og segði, at hann var ósamdur við tí, sum stóð her. „Markið millum frelsu og glatan er alt ov skarpt. Tað kann væl hugsast, at tað er eitt millumting.“

Maðurin, sum hevði býtt út traktatirnar, svaraði: „Í dag var ætlanin, at eg skuldi hitta ein vinmann á jarnbreytarstøðini, tí vit skuldu fylgjast á hesi ferðini. Eg var í góðari tíð og hugdi eftir vinmanni mínum, men eg sá hann ongastaðni. Kanska er hann kortini komin við hesum toki í evstu løtu. Tað fáa vit at síggja, tá ið vit um eina løtu fara úr tokinum. Men hvussu tað enn er, so kann tað ongantíð blíva eitt millumting. Annaðhvørt er hann við her í tokinum, ella so er hann tað ikki. Annaðhvørt hittast vit, tá ið vit stíga út úr tokinum, ella gera vit tað ikki.“

Tað bleiv so undarliga kvirt í klivanum eftir hesi orð.

*Effie Campbell* umsetti.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 21. mai | **Tekstur:** | Jóh. 14,1-3; Mark. 16, 19-20 og Matt. 24, 30-31 | **Bíbliuorð:** | Jóh. 14,2a |
| 28. mai | **Tekstur:** | Áps. 2,1-18 og Jóhs. 14,26-27 | **Bíbliuorð:** | Jóh. 14,26b |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




**Nr. 12** *4. juni 2023* **83. árg.**

# Jesus var ein bíbliufundamentalistur

Vit liva í einari tíð, har fólk eru atfinningarsom móti Bíbliuni; ja, sjálvt kristin seta spurnartekin við nógvar frásagnir í Bíbliuni. Tí er tað so stórt fyri mær, at Jesus ONGANTÍÐ setti spurnartekn við Gamla Testamenti, sum hann kallaði Skriftirnar – men at hann altíð váttaði tað, ið har stóð.

Í samrøðuni við báðar lærusveinarnar úr Emmaus byrjaði Jesus við Mósesi og frá øllum profetunum og legði út fyri teimum úr øllum skriftunum tað, sum skrivað var viðvíkjandi honum. Luk. 24,27.

Í Markusi 2,25 sigur Jesus: „Hava tit ongantíð lisið, hvat Dávid gjørdi, tá ið hann var neyðstaddur og hungraði, bæði hann sjálvur og teir, sum við honum vóru?“ Jesus staðfestir tað, sum Dávid sigur í 1. Sámuel 21,6.

Í Matt. 12,40 sigur Jesus: „Líkasum Jónas var í hvalabúkinum tríggjar dagar og tríggjar nætur, soleiðis skal menniskjusonurin verða tríggjar dagar og tríggjar nætur undir moldum.“ Mong hava trupulleikar av hasi frásøgnini. Tað hevði Jesus ikki. Hann staðfesti tað, sum Jónas upplivdi í Bók Jónasar.

Dánjal profetur fekk sjónir, sum nágreiniliga greiða frá tí síðsta av endatíðini, og eisini um Antikrist og Stóru Trongdina. Jesus staðfestir opinberingarnar hjá Dánjali m.a. í Matt. 24,15, har Jesus sigur: „Tá ið tit síggja andstygd oyðingarinnar, sum talað er um av Dánjal profeti, standa á heilagum staði – tann, ið hetta lesur, hann gevi tí gætur – tá rými tey, sum eru í Judea, til fjals.“

Og í Matt. 24,21 sigur Jesus: „Tá skal verða mikil trongd, slík sum hon ikki hevur verið frá upphavi heimsins og til henda dag, og sum hon ongantíð skal verða.“ Jesus vísir m.a. til Dán. 9,27 – 11,31 – 12,1 – 12,11.

Tá ið sonur Guds, mín Harri og Frelsari, er fundamentalistur, av tí at Hann bókstaviliga trýr á Heilagu Skriftina, so eri eg tryggur og skammi meg ikki yvir at trúgva, at tann Gud, sum frelsti ein treiskan Jónas út úr búkinum á havdýrinum – Hann bæði kann og vil eisini frelsa meg – og eisini teg, um tú vilt lata Jesus frelsa teg.

*Effie Campbell* umsetti.

# Ein vitnisburður um grøðing

Ein norsk kona, sum eitur Helga, kemur við sínum vitnisburði í bókini „Ennå er det håp!“ Hetta er ein bók, har Lise og Ludvig Karlsen siga frá sínum skakandi og spennandi lívi undan og eftir, at tey stovnaðu Evangeliesenteret.

Helga greiðir soleiðis frá: „Eg hevði multippel sklerose og var næstan blind. Bara umleið 20 prosent vóru eftir av sjónini. Høgra hond og armur vóru heilt yvirtikin av sjúkuni, og eg orkaði lítið.

Eg hevði fingið avlamispensión í fleiri ár. Læknarnir fingu ikki hjálpt mær, so eg fyrireikaði meg til eitt lív í myrkri og í koyristóli, har eg gjørdist ósjálvbjargin og hevði tørv á, at onkur hjálpti mær.

Men gjøgnum allar plágur og depressiónir legði eg allar mínar trupulleikar yvir á Jesus. Eg fekk einki annað gjørt enn hvílt í lyftum hansara. Ikki ein spurvur fellur til jarðar, uttan at hann veit av tí.

Á sumri 1982 á Norður-Noregs-stevnuni í Sandvik Folkehøgskole sat eg uppi á loftinum á fyrrapartsmøtinum leygardagin. Ludvig Karlsen talaði um Guds góðsku og kom inn á altargangin.

Tá fór eg at hugsa um frásøgnina í Markus 5, um konuna við blóðsótt. Hon nam bara við Jesu klæði, og so varð hon grødd í somu stund. Jesus segði við hana: „Trúgv tín hevur frelst teg. Far tú heim í friði, og ver frísk av meini tínum!“

Í dag taka vit Jesu likam og drekka blóð hansara í altarganginum. Sum vit hava lítla trúgv! Jesus er jú hin sami!

Longur kom eg ikki í mínum tonkum.

Tað var sum eitt slør varð drigið burtur frá eygum mínum. Eg sá heilt týðiligt og námgreiniligt! Eg sá niður í salin og kendi fleiri fólk aftur. Ludvig, sum stóð og talaði, sá eg heilt skilliga.

Gleðin floymdi upp í hjarta mítt. Eftir einari løtu var eg frísk! Høgra hond og armurin fóru so smátt at rigga.

Eg fór út av møtinum og kendi meg so kensluríka av øllum, sum eg sá. Plantur og trø lýstu so litføgur móti mær. Fyri at fáa tað staðfest, sum var hent, fór eg til eygnalæknan, sum hevði viðgjørt meg í fleiri ár.

Eg segði honum, at eg sá aftur nú. Hann ivaðist, men eftir at hava kannað meg og tikið sjónarroyndina kundi hann staðfesta, at eg sá líka væl sum hann. Nú spurdi hann, hvat ið var hent. Eg segði honum tað og spurdi, um tað var medisinskt gjørligt.

„Hetta er eitt undur. Tað er meir millum himmal og jørð, enn vit menniskju skilja," var svarið, læknin gav.

Nú eru skjótt fýra ár síðani, og sjónin er enn líka góð!

Umframt arbeiðið her í mínum heimi við fýra børnum, arbeiði eg nú í hálva tíð sum jarðarmóðir.

Jesus eigur alla æruna.

Ein innilig heilsan til tykkum øll frá Helgu"

*Effie Campbell* umsetti.

# Bøn

„Tí eiga tit at biðja soleiðis: Faðir vár, tú sum ert í himlunum! Heilagt verði navn títt; komi ríki títt, verði vilji tín sum í himli so á jørð; gev okkum í dag okkara dagliga breyð; og fyrigev okkum skuldir okkara, so sum vit fyrigeva skuldarum okkara; og leið okkum ikki í freistingar; men frels okkum frá tí illa." Matt. 6,9–13.

Tað eru mangar bønir í Bíbliuni, bønir um útfrían, um leiðslu, um fyrigeving, um einleika o.s.fr. Men tað er bara ein einasta bøn, ið Jesus lærdi okkum at biðja, nevniliga bønina „Faðir vár".

Tá ið samanum kemur, hvør man so vita meir um bønn enn hann? Kunnu vit ímynda okkum, at Jesus lærdi okkum eina bøn, sum ikki fór at nema Guds hjarta, verða hoyrd av honum og fáa neyðuga svarið?

*Effie Campbell* umsetti.

# HIN FINSKI SMÁDRONGURIN

*(P.W. Háberg)*
**Lag:** *Silver Threads*

Mamma, sig mær, hví tú grætur,
sig mær, hvat ið bagir tær?
Eg fór út til Karl at spæla;
men øll grótu úti har.
Mamma, pápi Karl er deyður,
systir Karl fortaldi tað,
tí ein, sum tey kalla Russin,
hevur skotið hann í dag.

Mamma, sig mær, hvar er pápi?
Far og bið hann koma heim,
áðrenn Russurin kann koma
til at skjóta eftir teim.
Og tey stóru, ljótu flogfør,
larmandi og málað reyð,
sum tú ert so bangin fyri,
– mamma sig, hvat vilja tey?

Sig mær, hví vit altíð skulu
leita okkum bumbuskjól?
Sig mær, verða aldri aftur
heimlig, friðfull barnajól?
Mamma, mamma, tá tú grætur,
eisini eg gráta má.
Mamma – eiga vit ei vinir,
sum vit kunnu líta á?

---

Uppskriftin uppá at liva eitt sterkt lív, eitt kraftfult lív er: Jesus sigur tað, og eg geri tað. Uppskriftin uppá at liva eitt máttleyst lív er: *Jesus sigur tað. Eg geri tað ikki.* – So einfalt er hatta.

*e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 4. juni | **Tekstur:** | Dán. 6, 1-25 | **Bíbliuorð:** | Dán. 6,27b |
| 11. juni | **Tekstur:** | Áps. 9,1-19 | **Bíbliuorð:** | Mark. 16,15 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74